Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Ársfrágreiðing

2019

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

## Innihaldsyvirlit


Vælkomin ... 2
Visjónsarbeiðið ... 2
Sáttmálasamráðingar ... 3
Sáttmálaskeiðið 2017 – 2019 ... 4
Yvirlit yvir semjur og sáttmálar hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum ... 4
Sáttmálaskeiðið 2019 – 2021 ... 5
a. Sáttmálin við Heilsuhjálparafelag Føroya ... 5
b. Sáttmálin við Starvsmannafelagið ... 5
c. Samráðingar og COVID19 ... 6
Persónsupplýsingarlógin og viðgerð av viðkvæmum upplýsingum ... 6
Arbeiðsmarknaðarlóggáva - frítíðarlógin ... 7
Búskaparfrágreiðing ... 8
Hoyringar ... 8
Lógaruppskot um at leingjan av rættinum til barsilspening ... 8
Lógaruppskot um at banna mismun og at tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum ... 9
Flokking av kommunalum størvum ... 10
Verkætlanir ... 11
Endi ... 12
Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ... 14

## Vælkomin

Góðu fundarfólk!

Tit verða øll bjóðaði hjartaliga vælkomin á hendan ársfundin hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, bæði tit, sum sita her í fundarhølinum – og tit, sum luttaka á teams.

Hetta er ein serlig støða – ella heldur ein serlig tíð vit hava verið í gjøgnum, nú tann herviliga korona farsóttin hevur gjørt um seg um allan heimin. Fyri at minka um spjaðingina av koronavirusinum, vórðu tiltøk set í verk av landsmyndugleikunum frá miðjan mars 2020. Tiltøk, sum hava havt við sær, at vit flest øll støðgaðu á eina løtu. Í byrjanini av korona-tíðarskeiðinum vóru vit í samráðingum við fleiri fakfeløg - vit megnaðu akkurát at fáa eina semju í hús, áðrenn alt samfelagið støðgaði upp. Semja var gjørd við Heilsuhjálparafelagið, sum fekk eina lønarhækkan, sum svaraði til tíðarskeiðið. Hinar samráðingarnar m.a. við Starvsmannafelagið støðgaðu upp grundað á tiltøkini, ið vóru sett í verk av landsmyndugleikunum.

Tað er ein tíð áðrenn korona – og ein tíð aftaná korona. Fakfeløgini, sum megnaðu at samráðast um egnar sáttmálar, áðrenn korona-tiltøkini vórðu sett í verk, hava fingið lønarhækkan samsvarandi lagda karminum. Fakfeløg, sum ikki hava gjørt semju, verða nú ávirkaði av broyttu umstøðunum, av óvissu búskaparligu útlitunum – og kunnu vænta eina meira varisliga lønarhækkan. Samstundis mugu vit ansa eftir, at inntrivini ikki verða størri enn neyðugt.

Í hesi serligu koronatíð hava vit fingið stundir at hugsa okkum um – soleiðis, at vit kunnu arbeiða og umgangast meira skynsamt. Vit síggja nú, at koronatíðin eisini hevur fingið okkum at hugsa øðrvísi, vit royna aðrar møguleikar, bæði í mun til dagliga arbeiðið, at arbeiða heimanífrá, at samskifta - og fleiri fundir verða hildnir yvir skype og teams o.a. Talan er um at finna arbeiðshættir, sum hóska til einstøku starvsfólkini og einstøku arbeiðsplássini til frama fyri bæði starvsfólk og leiðslur.

Samráðingarnar og annað arbeiðið er nú tikið upp aftur, kanska meira varisliga enn undan korona, men vit eru í gongd aftur. Eg fari nú at greiða tykkum nærri frá arbeiðinum hjá KAF í 2019, kanska mest frá gongdini í samráðingunum á kommunala arbeiðsmarknaðinum – vit hyggja eisini frameftir, og komið verður eisini nakað inn á ymisk viðurskifti, sum ganga inn í 2020.

## Visjónsarbeiðið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið arbeiðir, sum eisini greitt frá undanfarin ár, alla tíðina við at menna visjónsarbeiðið í felagnum - og við at endurskoða endamálið við felagnum, við støðugt at skapa eina felags fatan av teimum uppgávum, sum felagið skal arbeiða við vísandi til viðtøkur felagsins § 2.

Fyrisitingin í felagnum arbeiðir hvørt ár við at gera eina yvirordnaða ætlan yvir arbeiðið fyri inniverandi ár. Í arbeiðsætlanini fyri 2019 vóru komandi samráðingarnar raðfestar høgt. Stórur dentur verður lagdur á at verða væl fyrireikaður – at hava góða fatan av búskaparligu støðuni soleiðis, at lønarhækkingar samsvara gongdini í samfelagnum og búskaparligum tilráðingum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur heitt á búskaparfrøðing, um at gera eina meting av búskaparligu støðuni – og av øðrum faktorum, ið hava ávirkan á lønarhækkanir í landinum, serliga á kommunala og almenna økinum. Frágreiðingin skal brúkast í arbeiðinum við lønarlagnum fyri komandi samráðingarumfar 2019 – 2021/2022.

Umframt við beinleiðis ráðgeving – og vegleiðing um sáttmálaviðurskiftini samt lønar- og setanarviðurskiftini hjá starvsfólkunum í kommununum, hjá SEV og IRF skipar felagið regluliga fyri sáttmáladøgum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið raðfestir samskiftið við kommunalu arbeiðsgevararnar, við fakfeløgini – og dentur hevur seinastu tíðina verður lagdur á at skipa netverk innan dagstovnaøkið og starvsfólkaøkið.

Visjónsarbeiðið – ætlaða arbeiðið fyri inniverandi á er gott at stuðla seg uppat, men oftani er trupult at røkka øllum settu málunum – og neyðugt er leypandi at endurskoða arbeiðsætlanina.

Í ár hava verið serlig viðurskifti, sum hava gjørt seg galdandi, tá ræður um at útseta arbeiðsuppgávur til seinni tíðarskeið. Tvey av starvsfólkunum í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum valdu at fara úr starvi í 2019 – og taka við nýggjum avbjóðingum. Hetta hevði við sær, at fleiri uppgávur, ið vóru raðfestar – og klára at føra út í verki í 2019 støðgaðu upp, ella vóru fluttar til 2020.

Síðani er tvey nýggj starvsfólk sett í starv í felagnum fyrst Jónleyg J. Bech, sum byrjaði í starvinum í september 2019 – og seinni Bina Reginsdóttir, sum byrjaði í starvi í mars 2020.

## Sáttmálasamráðingar

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið, lønardeildin hava seinastu árini havt eitt ávíst samstarv, harímillum eitt yvirskipað samstarv, eitt samstarv um fyriskipan av samráðingum á almenna/kommunala sáttmálaøkinum – og eitt samstarv um felags sáttmálar – og onnur viðurskifti um løn- og setanarviðurskifti av felags áhuga.

Samstarvið undan samráðingunum, sum byrjaðu í oktober 2019 var einki undantak. Partarnir hava havt fundir um, hvørt partarnir skuldu hava felags samráðingar – ella um samráðast skuldi hvør sær. Semja var um, at Fíggjarmálaráðið byrjaði samráðingarnar við Starvsmannafelagið, legði støðið, áðrenn Kommunala Arbeiðsgevarafelagið byrjaði sínar samráðingar.

Yvirordnað hava vit umboðandi almennu og kommunalu arbeiðsgevararnar verið samd um útgangsstøðið fyri samráðingunum. Samstarvið virkar fyri meginpartin væl, men tað eru

sjálvandi viðurskifti, har land og kommunur hava ymisk áhugamál og ymiska áskoðan á viðurskiftini.

Eitt av viðurskiftunum, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið hava havt avbjóðingar við seinastu árini er at fáa eina felags fatan av, hvussu víttfevnandi heimildin hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum er, tá ræður um at gera sáttmálar fyri kommunalt sett starvsfólk – og hvussu vítt góðkenningarheimildin hjá Fíggjarmálaráðnum røkkur.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er av tí fatan, at góðkenningarheimildin hjá Fíggjarmálaráðnum í § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini ikki forðar fyri, at munir kunnu verða á lønum hjá landinum og kommununum. Hóast hettar, so má kortini verða talan um eitt javnt, men ikki identiskt lønarlag millum starvsfólk í starvi hjá landinum og kommununum. Hendan áskoðanin gevur eitt ávíst rásarúm til kommunurnar at samráðast, at gera sjálvstøðugar sáttmálar, sum ikki altíð liggja á júst sama støði, sum sáttmálarnir hjá landinum – somuleiðis verður givið Fíggjarmálaráðnum eitt ávíst rásarúm at góðkenna sáttmálar, sum kommunurnar gera.

## Sáttmálaskeiðið 2017 – 2019

Samráðingarnar í tíðarskeiðinum vóru merktar av at arbeiðsgevarasíðan hevði gjørt av at lønarhækkanin skuldi latast í krónum. Ætlanin hjá arbeiðsgevarasíðuni við at lata lønarhækkanina í krónum var at minka um gjónna millum tey sokallaðu láglønarfeløgini og hálønarfeløgini. Fyrsti sáttmálin, sum var gjørdur millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið bygdi á eina lønarhækkan í krónum, meðan fleiri av eftirfylgjandi sáttmálunum bygdu á prosent.

## Yvirlit yvir semjur og sáttmálar hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum

***Føroya Pedagogfelag***, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdu aftaná drúgvar samráðingar og seming avtalu um nýggjan 3 ára sáttmála frá 1. okt. 2017 – 1. okt. 2020.

***Starvsmannafelagið*** og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdu ein 2 ára sáttmála galdandi frá 1. okt. 2017 til 1. okt. 2019.

***Heilsuhjálparafelag Føroya*** og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørdu semju um at endurnýggja verandi sáttmála fyri næstu 2 árini – frá 1. okt. 2017 til 1. okt. 2019.

***Danska Tannlæknafelagið*** og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið longdu galdandi sáttmála í 2 ár frá 1. okt. 2017 til 1. okt. 2019.

***Føroya Skipara- og Navigatørfelag*** og Kommunala Arbeiðsgevarafelag gjørdu semju um at endurnýggja verandi sáttmála partanna millum í eitt 2 ára skeið frá 1. okt. 2017 til 1. okt. 2019.

***Maskinmeistarafelagið*** og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gera semju (seming) um ein 2 ára sáttmála frá 1. okt. 2017 – 1. okt. 2019.

***Heilsurøktarafelagið*** og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gera semju fyri 2 ár – frá 1. okt. 2017 til 1. okt. 2019.

***Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaran*** og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið leingja galdandi sáttmála 2 ár – frá 1. okt. 2017 – 1. okt. 2019.

***Føroya Arbeiðarafelag sáttmáli fyri dagrøktarar***
Partarnir samdust um at framskriva sáttmálan við somu lønarhækkan, sum dagrøktarar í sáttmála okkara við Starvsmannafelagið fingu. Sáttmálin er galdandi fyri tíðarskeiðið 1. okt. 2017 – 1. okt. 2019.

## Sáttmálaskeiðið 2019 – 2021

Undan samráðingunum fyri tíðarskeiðið 2019 og frameftir samdust Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið – eins og undanfarin ár um, at útgangsstøðið fyri lønarhækkanini fyri tíðarskeiðið skuldi verða ein lønarhækkan í krónum.

Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið løgdu støðið fyri samráðingarumfarið við eini samanseting av krónum og prosentum.

Fyrsti sáttmálin hjá KAF:

a. Sáttmálin við Heilsuhjálparafelag Føroya

Samráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið vóru drúgvar, og sum øllum kunnugt endaðu samráðingarnar við eini semingsroynd um miðjan mars mánað 2020 - ein kann siga í byrjanini av korona-tíðarskeiðinum. Dagarnir undan, at semingsuppskot varð lagt fyri partarnar fríggjadagin 13. mars 2020, vóru truplir, umboðini fyri partarnar vóru órógvaðir av korona-støðuni – og av útmeldingunum frá Landsstýrinum um ikki at møtast óneyðugt – og hægst 10 persónar saman.

Seinastu fundirnir partanna millum vóru avgreiddir yvir telefon og skype – ein nýggjur máti at samráðast uppá. Tíbetur bar á mál, báðir partar tóku undir við semingsuppskotinum leygardagin 14. mars 2020.

b. Sáttmálin við Starvsmannafelagið

Samráðingarnar við Starvsmannafelagið vóru komnar væl áleiðis í mars mánaði 2020. Samskiftið um nýggjan sáttmála bygdi á semjuna, sum gjørd varð millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Partarnir arbeiddu við at gera nýggja lønartalvu galdandi frá 1. okt. 2019 – eina lønartalvu, har lønirnar skuldu hækka ávikavist við 795 kr. og 595 kr. um mánaðin. Seinna árið skuldi lønirnar hækka við 2,25% fyri øll lønarstigini.

Ein kann siga, at tað var ein støðgur í samráðingunum, sum var grundaður í, at Starvsmannafelagið skuldi hava aðalfund tann 7. mars 2020, sum gjørdist orsøk til at semja ikki kom í hús, áðrenn vit komu inn í tað sokallaða korona-tíðarskeiðið. Soleiðis varð eingin semja gjørd við Starvsmannafelagið undan korona-tíðarskeiðinum, meðan Súni Selfoss, formaður varð afturvaldur til formann fyri Starvsmannafelagið fyri næsta skeiðið.

c. Samráðingar og COVID19

Undan korona-tíðarskeiðinum, í endanum av februar mánaði 2020 varð KAF í samráðingum við Starvsmannafelagið, handverkarafeløgini, Maskinmeistarafelagið og Heilsuhjálparafelagið.

Fleiri onnur fakfeløg ynsktu eisini at koma í gongd við samráðingarnar, men hesi fingu boð um at bíða til samráðingarnar við m.a. Starvsmannafelagið og Heilsuhjálparafelagið komu uppá pláss.
Sum greitt er frá omanfyri varð semja gjørd við Heilsuhjálparafelagið í byrjanini av korona-tíðarskeiðinum tann 14. mars 2020, meðan samráðingarnar við hini fakfeløgini vóru útsettar í fyrstu atløgu til tann 31. mars 2020. Síðani hava vit ásannað, at korona-tíðarskeiðið skuldi gerast nógv meira umfatandi og drúgvari enn við á nakran hátt kundu ímynda okkum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fylgdi á sama hátt, sum alt kommunuhúsið o.o. tilráðingunum frá Landsstýrinum um ikki at samlast óneyðugt.

Nú komið er út í mai mánað 2020, er samskiftið tikið upp aftur fyrst millum arbeiðsgevararnar: Fíggjarmálaráðið, Vinnuhúsið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um, hvussu víðari skal farast fram í samráðingunum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er í løtuni í einum ávísum samskifti við Starvsmannafelagið og Maskinmeistarafelagið.

## Persónsupplýsingarlógin og viðgerð av viðkvæmum upplýsingum

Kommunufelagið og harundir Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Barnaverndarstovan eru við í eini tilgongd fyri at tryggja, at feløgini liva upp til reglurnar í lógini um persónupplýsingar. Tilgongdin at tryggja, at mannagongdirnar í felagnum liva upp til lógarásettu krøvini verður gjørd saman við fyritøkuni Wired Relations.

Fyrstu fetini at tryggja, at felagið livir upp til lógarinnar krøv eru sett í verk – vit hava eyðmerkt tær skipanir felagið brúkar, harímillum KT-skipanir. Tá allar skipanirnar felagið brúkar eru eyðmerktar – og reglur eru gjørdar fyri, hvussu skipanirnar verða nýttar á tryggan og forsvarligan hátt – og í tráð við galdandi lóggávu verður umsókn send Dátueftirlitinum um trygdargóðkenning.

Umsókn er send Dátueftirlitinum um trygdargóðkenning.

Næsta stigið er at tryggja, at allar prosessir í felagnum, harímillum handfaring av skjølum í teldupostsamskifti, journalisering o.a. eru í lagi – og liva upp til lógarinnar krøv.

Umsókn um viðgerðarloyvi at viðgera viðkvæmar upplýsingar sambært løgtingslógini um persónupplýsingar er send Dátueftirlitinum í november 2019.

## Arbeiðsmarknaðarlóggáva - frítíðarlógin

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Barnaverndarstovan hava arbeitt við einum málið um rættin hjá fosturforeldrum til frítíð sambært løgtingslógini um frítíð við løn.

Tað er Fosturforeldrafelagið, sum heitti á Samferðslumálaráðið, sum umsitur frítíðarlógina um at fáa staðfest rættin hjá fosturforeldrum til frítíð við løn eftir løgtingslógini um frítíð við løn.

Samferðslumálaráðið hevur viðgjørt áheitanina frá Fosturforeldrafelagnum við fyrst at meta um, hvørt fosturforeldur kunnu metast at verða løntakarar – og harvið at koma undir reglurnar í frítíðarlógini. Hareftir var eisini hugd at aðrari viðkomandi lóg- barnaverndarlógini, rættarstøðuni í grannalondunum o.ø.

Út frá eini yvirskipaðari meting, sum Samferðslumálaráðið hevur latið gera, kom ráðið fram til, at fosturforeldur kunnu metast sum løntakarar, og at fosturforeldur harvið koma undir frítíðarlógina – og hava rætt til frítíð við løn sambært lógini.

Samferðslumálaráðið byggir sína meting um, at fosturforeldur eru løntakarar á niðanfyristandandi starvseyðkenni:

a) Tú kemur í eitt arbeiðsgevara-/arbeiðstakarasamband
b) Tú skalt gera arbeiðið persónliga
c) Tú skalt taka ímóti boðum
d) Tú fært ávístan ein nærmasta fyrisetta
e) Tú fært ávíst arbeiðspláss
f) Tú fært útgerð frá arbeiðsgevaranum
g) Tú fært at vita, nær tú skalt arbeiða, og nær tú skalt hava frí
h) Tú skalt ikki átaka tær annað arbeiðið
i) Tú fært frítíðarløn ella frítíð við løn
j) Ert tú sjúk, skalt tú boða frá

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur undir við, at omanfyrinevndu starvseyðkenni kunnu brúkast í metingini, men tekur ikki undir við niðurstøðuni hjá Samferðslumálaráðnum um, at fosturforeldur kunnu metast at verða løntakarar.

Frítíðarlógin er ófrávíkilig – og hevur við sær, at ein bólkur/persónur, sum er fevndur av frítíðarlógini, skal halda frí sambært frítíðarlógini. Um ein persónur er fevndur av frítíðarlógini, ber sostatt ikki til at gera av ella at avtala, at persónurin, hóast hann er fevndur av frítíðarlógini, ikki skal halda frí, men í staðin skal fáa útgoldið møguliga frítíð, sum viðkomandi ikki hevur møguleika fyri at halda.

Flest øll eru samd um, at fosturforeldur heilt einfalt ikki kunnu halda "frí" frá sínum fosturbørnum. Hetta m.a. tí, at fosturbørnini ikki megna broytingina, sum tað viðførir. Vísandi hartil og til omanfyristandandi atlit gevur tað onga meining at avgera, at fosturforeldur skulu verða fevnd av frítíðarlógini.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Barnaverndarstova Føroya hava grundgivið fyri sínum sjónarmiðum – og hava heitt á Samferðslumálaráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

Ráðið hevur tikið áheitanina til eftirtektar og viðger málið av nýggjum, men hevur ikki gjørt nýggja niðurstøðu í málinum higartil.

## Búskaparfrágreiðing

Eftir ynski frá nevndini hava vit í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum heitt á Johnny í Grótinum um at gera eina búskaparfrágreiðing, sum eisini skal taka støði í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum o.ø. viðurskiftum, sum hava serligan áhuga fyri felagið – og sum eru viðkomandi í mun til fyriliggjandi sáttmálasamráðingar á almenna/kommunala arbeiðsmarknaðinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur í tveimum umførum gjørt avtalu við Johnny Í Grótinum, búskaparfrøðing um at gera eina felags búskaparfrágreiðing fyri stovnin. Aftrat búskaparfrágreiðingini er ætlanina at brúka Johnny í Grótinum til ráðgeva í samskiftinum um karm, sum felagið við jøvnum millumbili hevur við Fíggjarmálaráðið, landsstýrismannin við Fíggjarmálum.

Arbeitt verður í løtuni við at gera eina innanhýsis frágreiðing, um hvørja ávirkan støðan við korona kann hava á víðari samráðingarnar, við tey fakfeløg, sum enn ikki hava gjørt sáttmála fyri tíðarskeiðið 2019 – 2021. Hugt verður m.a. at, hvørja ávirkan korona kann koma at hava á niðanfyristandandi viðurskifti:

**Búskaparligu útlitini**

- Vøksturin í BTÚ
- Stór avlop á gjaldjavnanum
- Lítil prísvøkstur
- Onki arbeiðsloysi
- Stórar privatar íløgur

**Útlitini fyri kommunala geiran**

- Fleiri og fleiri eldri borgarar í kommununum
- Fleiri børn og krøv um hægri normeringar
- Stórur eftirspurningur uppá faklærd starvsfól
- Talgilding og íverksetan av nýggjari tøkni
- Stórar íløgur í eldrabústaðir og dagstovnar

## Hoyringar

### Lógaruppskot um at leingjan av rættinum til barsilspening

Samgongan hevur sett sær fyri at leingja rættin til barsilspening upp til eitt ár. Landsstýrið hevur í hesum valskeiðinum longt rættin til barsilspening frá 38 vikum til 46 vikur eftir barnsburð. Við hesum lógaruppskotinum verður rætturin til barsilspening longdur við enn tveimum vikum til 48 vikur – málið hjá samgonguni er at leingja tíðarskeiðið upp til 52 vikur.

Nevndin í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum hevur umrøtt uppskotið hjá Samferðslumálaráðnum um broytingar í løgtingslóg um barsilsskipan viðv. leingjan av rættinum til barsilspening í tvær vikur, harav tann eina vikan fer til pápan – og hin vikan fellur í felagspuljuna.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur ongar viðmerkingar – og tekur undir við broytingaruppskotinum.

## Lógaruppskot um at banna mismun og at tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum

Líknandi lóggáva er í grannalondunum. Eingin lóg er í gildi í Føroyum í dag, sum so ítøkiliga tryggjar javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum, og sum verjir mótvegis mismuni á arbeiðsmarknaðinum.

Henda lóg fylgir í stóran mun ásetingunum í donsku lógini um "forskelsbehandling", men nakað er við íblástri úr lógini um "ligebehandling". Javnstøðulógin hevur nakrar avmarkaðar ásetingar, men ein beinleiðis verja móti mismuni manglar, eins og tað manglar ein lóg um javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum. Meginreglur um javnviðgerð og bann mótvegis mismuni av øllum handa slagi eru kjarnuhugtøk í fólkaræðinum, og neyðugt er at geva fólki serliga verju mótvegis mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna síni eyðkenni ella frábregði.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur viðmerkt at talan er um lógaruppskot, sum kemur at hava stóra ávirkan á føroyskan arbeiðsrætt, um uppskotið verður samtykt.

Talan er um arbeiðsmarknaðarlóggávu, sum hevur umfatandi broytingar við sær – tí var fylgibólkur við umboðum frá arbeiðsmarknaðinum settur at luttaka í arbeiðinum við lógaruppskotinum. Fylgibólkurin var bert kallaður saman til ein innleiðandi fund – og fekk annars bert høvi til at gera skrivligar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Lógaruppskotið leggur upp til stórar broytingar innan m.a. brek hugtakið í § 1 – brek hugtakið umfatar í hesum føri í ávísan mun eisini langtíðarsjúku.

Í Danmark eru fleiri arbeiðsgevarar dømdir at rinda heilt munandi upphæddir í viðurgjaldi fyri ikki at kunna lyfta tillagingarskyldugna sambært § 5, sum arbeiðsgevari verður álagdur í samband við uppsøgn av starvsfólki, ið ikki fáa røkta teirra starvs grundað á sjúku.

Vísandi til § 3 í lógaruppskotinum verður tað ikki longur loyvt at nýta aldur sum eitt atlit í sambandi við starvsetanir, uppsøgn o.a. Undantak verður givið í ávísum føri til ung undir 18 ár – og í mun til 67 ára aldursmarkið í pensjónsslógin.

Samanumtikið kann ein siga, at verður fráfaringaraldurin tikin av, so verður tað alt annað líka meira umsiting av at siga starvsfólki úr starvi, sum vegna aldur missa sín/sínar arbeiðsførleikar. Haraftrat hava arbeiðsgevarar eisini vísandi til § 5 eina skyldu at tillaga umstøðurnar hjá hesum starvsfólkum til minkandi førleikarnar.

Grundað á eina alt ov stutta hoyringsfreist var tað ikki gjørligt at fáa eitt greitt yvirlit yvir, hvørja áskoðan kommunurnar hava í mun til at taka av fráfaringaraldurin.

Viðv. lógaruppskotinum um at forða fyri mismuni og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum er at siga, at uppskotið ikki var lagt fyri tingið. Lógaruppskotið verður væntandi lagt fyri tingið aftur, men helst við ymiskum tillagingum.

## Flokking av kommunalum størvum

Seinastu árini hevur tað gingið væl í búskapinum. Góða rákið hevur havt við sær, at kommunalir arbeiðsgevarar hava verið í kapping við hvønn annan um starvsfólk, kanska serliga faklærd starvsfólk, tað verið seg starvsfólk við tekniskum útbúgvingum, maskinmeistarar o.o. Somuleiðis, hava bæði dagstovnaøkið og eldraøkið havt trupulleikar við at manna tey leysu størvini á økinum.

Fyri at varðveita góðu og dugnaligu starvsfólkini, og fyri at fáa starvsfólk at søkja starv í kommununum síggja vit, at kommunalir arbeiðsgevarar seinastu árini í stóran mun hava arbeitt við at fáa síni starvsfólk upp í løn. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur fingið sera nógvar umsóknir um umflokkingar av verandi størvum, umflokkingar sum eru reistar av arbeiðsgevarunum sjálvum, men eisini í fleiri førum eftir áheitan frá starvsfólkunum, gjøgnum teirra fakfelag.

Sambært sáttmálum okkara á kommunala sáttmálaøkinum skulu øll størv, sum ikki frammanundan eru flokkað (nýggj størv) flokkast, áðrenn tey verða lýst leys alment. Ein møgulig flokking, sum ikki greitt er ásett í einum galdandi sáttmála, krevur sambært kommunustýrislógini § 5, stk. 5 góðkenning av landsstýrismanninum við Fíggjarmálum.

Allar nýggjar flokkingar, samt umflokkingar og avtalur um løn- og setanarviðurskifti á kommunala arbeiðsmarknaðinum skulu sendast Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum til viðgerðar.

Vanliga mannagongdin í samband við flokkingar er, at kommunurnar/ kommunalir- og interkommunalir arbeiðsgevarar venda sær til Kommunala Arbeiðsgevarafelagið við áheitan um, at fáa flokkað ávíst starv. Sama mannagongd er galdandi, tá starv skal flokkast á einum sáttmálaøki, har Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ikki hevur sáttmála frammanundan. Flokkingarmálini verða fyrst tikin til viðgerðar saman við viðkomandi fakfelagi, og verða seinni send Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar, um starvið ikki rúmast innanfyri galdandi sáttmála ella lønartalvu.

**Kommunustýrislógin § 5, stk. 5 er soljóðandi:**
Ásetingarnar í sáttmálum og avtalum um lønar- og setanarviðurskifti fyri kommunal starvsfólk (íroknað kommunalar felagsskapir) og flokkingar og stig fyri størv, sum ikki frammanundan greitt eru ásett í sáttmála ella avtalu, skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

**Viðmerkingarnar til kommunustýrislógina § 5, stk. 5 siga:**
Til stk. 5.: Ásetingin skal verða við til at tryggja eitt javnt alment lønarlag og at samsvar er millum lønir hjá landinum og hjá kommunum. Sostatt skulu sáttmálar og avtalur, sum kommuna, kommunur ella kommunalir felagsskapir gera, har ásetingar eru um løn- og setanarviðurskifti góðkennast av landsstýrismanninum.
Viðvíkjandi flokkingum og stigum verður serliga hugsað um hægri størv.

## Verkætlanir

**Endurskoðan av lønarbygnaði hjá limum í Starvsmannafelagnum**

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið hava í sáttmála avtalað at gjøgnumganga lønarbygnaðin hjá limum í Starvsmannafelagnum - við tí fyri eyga at dagføra allar starvslýsingar og flokkingar av starvsfólkunum, sum virka á økinum hjá Starvsmannafelagnum. Í hesum liggur, at partarnir skulu kanna, um verandi størv hava tíðarhóskandi flokking.

Fyrsta stigið var at endurskoða lønarbygnaðin í miðfyrisitingini í Tórshavnar kommunu, síðani er ætlanin at fara víðari at endurskoða bygnaðin í øðrum kommunum, á SEV og hjá IRF.

**Arbeiðið er lagt til rættis soleiðis:**

*Starvslýsingar*
Heitt var á leiðarar/deildarleiðarar í umsitingini um lata Starvsfólkadeildini starvslýsingar hjá starvsfólkum. Eftirfylgjandi gjøgnumgekk starvsfólkadeildin starvslýsingarnar við avvarðandi leiðarar. Starvslýsingarnar og eftirfylgjandi gjøgnumgongd hevur verið grundarlag undir metingini av, hvørt størvini hava eina hóskandi flokking, ella um tey eiga at verða umflokkaði.

Treytin fyri at viðgera einstøku størvini er, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fær til vega góðkendar starvslýsingar. Størv, har eingin starvslýsing fylgir við verða ikki viðgjørd.

*Samanberingar*
Starvsmetingin tekur síðani útgangsstøði í eini samanbering við líknandi størv á øðrum arbeiðsplássum í kommunala geiranum og hjá landinum.

*Avvarðandi leiðarar viðmerkja niðurstøður hjá Starvsfólkadeildini/kommununi*
Skrivligu metingarnar hjá Starvsfólkadeildini/kommununi skulu síðani avstemmast við leiðararnar á ymisku deildunum.

*Avtala millum sáttmálapartarnar*
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur góðkent tilmælini um umflokkingar, sum kommunan hevur latið gera. Síðani vóru tilmælini viðgjørd í nevnd mannað av umboðum frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og Starvsmannafelagnum. Í fleiri førum eydnaðist tað pørtunum at røkka semju um nýggjar flokkingar, men har semja ikki fekst í lag var útgangsstøðið hjá kommununi brúkt, sum grundarlag fyri flokking.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið hava avtalað at taka arbeiðið upp aftur á heysti í 2020.

**Aðrar verkætlanir, ið eru avtalaðar í semju við fakfeløg**

*Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Heilsuhjálparafelag Føroya* hava sum mál at kanna, hvørt tað er møguligt hjá heima- og heilsuhjálparum at verða settir í starv við hægri setanarbrøki/fullum setanarbrøki.

*Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið* hava avtalað at skipa fyri átaki fyri at umrøða spurningin, hvussu almennar leiðslur handfara avgerandi broytingar og hvussu starvsfólk fáa høvi at verða við í broytingartilgongdum.

Fleiri aðrar verkætlanir og átøk eru avtalaði millum sáttmálapartarnar – verkætlanirnar verða raðfestar,og settar í verk saman við avvarðandi sáttmálapørtum.

## Endi

Kommunuval verður í heyst, valskeiðið er um at verða runnið – og fyri nøkur okkara í nevndini merkir hettar, at hetta er okkara seinasta ár, sum nevndarlimir í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum. Nøkur okkara stilla ikki upp aftur til kommunuvalið – og onnur verða ikki afturvald.

Tað er stýrið fyri Kommunufelagið, sum aftaná kommunuvalið skipar fyri valið av umboðum til nevndina í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum. Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limir eru tilnevndir, umboðini fyri SEV og IRF halda fram. Vanliga fer skiftið av nevndini fram skjótt eftir ársskiftið í februar/mars mánaði, men í seinasta lagi tann 1. mai.

Tað er neyðugt at hava eitt virkið kommunalt arbeiðsgevarafelag, serliga tá samstarvið við Fíggjarmálaráðið, lønardeildina, sum vit so mangan hava viðgjørt áður, ikki altíð gongur, sum vit ynskja – vit hava kortini, sum almennir/kommunalir arbeiðsgevarar nógv felags áhugamál og øki, har vit samstarva væl. Tó so, so mangla vit í ávísum førum at finna felags semjur um mál av stórum týdningi, har almenni og kommunali arbeiðsgevarin á jøvnum føti taka felags avgerðir um týdningarmestu málini. Tað er tí neyðugt, at vit framhaldandi geva okkara sjónarmið til kennar – og at vit framhaldandi royna at gera okkara ávirkan galdandi, tá ræður um arbeiðsmarknaðarviðurskifti, sum hava stóra ávirkan á kommunalar- og interkommunalar arbeiðsgevarar.

Fyri at koma væl í gongd við víðari samráðingunum, hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið avtalað fund við øll fakfeløgini á kommunala sáttmálaøkinum, hvørs sáttmálar fóru úr gildi 1. oktober 2019. Fakfeløgini eru bjóðaði til fundar hvør sær soleiðis, at tey kunnu greiða frá síni støðu hvør sær – og sínum sjónarmiðum viðv. víðari samráðingunum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fær við hesum eisini greitt frá síni støðu í víðari samráðingunum.

At enda skal eg sum forkvinna í felagnum takka nevndini fyri eitt sera gott og gevandi samstarv seinastu árini - og tykkum starvsfólkum fyri eitt gott og væl úr hondum greitt arbeiði.

Takk fyri.

Annika Olsen, forkvinna

## Nevnd og starvsfólk í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum

### Í nevndini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sita:

Annika Olsen, Tórshavnar Kommuna
Bogi Bendtsen, Elfelagið SEV
Brandur Sandoy, Sands Kommuna
Jógvan í Skorini, Eiðis Kommuna
Pauli Trónd Petersen, Vestmanna Kommuna
Poul Andreas Joensen, IRF

Varalimur fyri Brand Sandoy er:

Eyðdis H. Niclasen, Vága Kommuna

### Starvsfólk:

Anita Fuglø, leiðari
Jónleyg J. Bech, fulltrúi
Bina Reginsdóttir, fulltrúi

### Sáttmálar og avtalur

- Føroya Pedagogfelag fyri námsfrøðingar og hjálparfólk
- Starvsmannafelagið, høvuðssáttmálin og sáttmálin fyri dagrøktarar
- Heilsuhjálparafelag
- Danska Tannlæknafelagið
- Føroya Skipara- og Navigatørfelag
- Maskinmeistarafelagið
- Heilsurøktarafelagið
- Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna
- Føroya Arbeiðarafelag fyri dagrøktarar

    Serstakar avtalur

    1. Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
    2. Akademikarafelag Føroya
    3. Føroya Arbeiðarafelag – renovatión
    4. Havnar Arbeiðarafelag – renovatión
    5. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
    6. Fysioterapeutfelag Føroya
    7. Ergoterapeutfelagið
    8. Kost- og Føðslufelag Føroya

# Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**§ 1. Navn og limaskapur**

Stk. 1. Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.

Stk. 2. KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF.

Stk. 3. Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF.

Stk. 4. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

**§ 2. Endamál felagsins**

Stk. 1. Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

• samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt

• røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.

• virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir

• gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið

• virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst

•við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3. Upptøka**

Stk. 1. KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.

Stk. 2,  Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4. Útmeldan**

Stk. 1. Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.

Stk. 2. Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.

Stk. 3. Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5. Ársfundur**

Stk. 1. Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.

Stk. 2. Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.

Stk. 3. Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.

Stk. 4. Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.

Stk. 5. Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør. Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.

Stk. 6 Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.

Stk. 7. Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra

b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.

c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi

d) Innkomin mál.

e) Ymiskt

**§ 6. Nevndin**

Stk. 1. Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.

Stk. 2. Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.

Stk. 3. Nevndin ger sína egnu starvsskipan.

Stk. 4. Nevndin velur sjálv formann og næstformann.

Stk. 5. Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.

Stk. 6. Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.

Stk. 7. Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

Stk. 8. Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

## § 7 Skrivstovan

Stk. 1. Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.

Stk. 2. Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.

Stk. 3. Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.

Stk. 4. Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

## § 8 Limagjald

Stk. 1. Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.

Stk. 2. Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.

Stk. 3. KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.

Stk. 4. Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

## § 9 Tekning

Stk. 1. Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

## § 10 Samráðingarnevnd

Stk. 1. Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.

Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.

Stk. 2. Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.

Stk. 3. Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

## § 11 Roknskapur og grannskoðan

Stk. 1. Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.

Stk. 2. Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**

Stk. 1. Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.

Stk. 2. Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**

Stk. 1. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.

Stk. 2. Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**

Stk. 1. Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.

Stk. 2. Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.

Stk. 3. Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**

Stk. 1. Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.

Stk. 2. Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**

Stk. 1. Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014